*Framhald av síðu 9*

í stuttsøguni “Now Wakes the Sea”, 1963, feigur, bergtikin sum hann er av einari atlantiskari *femme fatale*. Conrad í “Chronopolis” setir seg upp ímóti tíðarløgregluni, tá hann fer at samla upp á ur og klokkur. Tað lukkast Powers í tí meistarligu “The Voices of Time”, 1960, at smúgva út úr tí liniera tíðarfongslinum. Eitt annað dømi um henda serliga persónslýsingarliga vinkulin er søgan “The Lost Leonardo”, 1964. Hesin teksturin er eitt slag av listasøguligari detektivsøgu. Charles, sum er stjóri fyri sølutinginum Northeby´s, og franski vinmaður hansara Georg de Stael leita eftir málninginum *Krossfestingin* eftir Leonardo da Vinci, sum er stolin úr Louvre í París. Meðan leitingin verður alt meira spennandi, gandar Ballard fram sítt egna frábrigdi av søgnini um Ahasverus, samstundis sum hann lýsir sín kærleika til Salvador Dali og til surrealismuna. Søgan rísur móti endanum, tá Charles og Georg, stutt frá húsunum hjá Dali við Port Lligat á Costa Brava, bera eyga við tjóvin. Ballard lýsir hann soleiðis:

*Á baksetrinum, við høvdinum snaraðum móti larminum, sat ein veldugur Rasputin-líkur skapningur í myrkum, nálastríputum klædningi, tær hvítu mansjettirnar og tann gylta slipsnálin glitraðu í skugganum, við handskasveiptum hondum á kross framman fyri sær helt hann um ein stav við fílabeinsskafti. Sum vit sviðu framvið, bar eg eyga við tað stóra, hugtunga høvdið, hvørs livandi andlitsdrøg út í æsir svaraðu til og undirbygdu tey, eg hevði sæð endurgivin av so mongum hondum á so mongum løriftum. Tey myrku eyguni glógvaðu sum logandi brandar, tær svørtu eygnabrýrnar stóðu út úr pannuni fattar sum veingir, tann skarpa sneiðingin á skegginum førdi tann sterka høkubugin peiggjandi út í luftina sum eitt spjót.*

“Tann horvna Leonardomyndin” er skrivað í 1964. Um vit nú taka tann ævisøguliga tráðin uppaftur, so tykist tað týðiligt, tá ein lesur t.d. skaldsøguni *The Kindness of Women*, at Ballard tey fyrstu mongu árini eftir kríggið var eltur — á traumatiskan hátt — av tí, hann hevði sæð og upplivað í


*William Burrough – høvuðsprestur hjá beat-ættarliðnum*

Shanghai og Lunghua. Aftrat tí kom, at álopini á Hiroshima og Nagasaki og royndarspreingingarnar við brintbumbum á oynni Eniwetok høvdu brent seg inn í hansara sinni. Hansara royndir fyrst at gerast lækni (og fáast við disseksjón) og seinni at læra til flogskipara vóru eitt slag av tvingsilskendari afturvendan til sjónir, sum ikki vildu sleppa honum.

Tað fór at lætta, tá ið Ballard í fimtiárunum giftist og fekk trý børn. James og Mary Ballard búsettust í Shepperton uttan fyri London. Um summarið gjørdu tey ferðir til Costa Brava, sum var ein partur av tí nýggja frítíðarparadísinum, sum varð bygt fram við miðalhavsstrondini, við hvítum hotellum, vassandi børnum og mjávaksnum amerikonskum gentum. Stutt frá tí vakra býnum Cadaqués búði Salvador Dali, og ivaleyst er “The Lost Leonardo” sprottin úr hesum landslagnum.

Eftir Cuba-kreppuna var toybil í viðurskiftunum millum Eystur og Vestur, heimurin brosaði, og Elvis og *The Beatles* boðaðu frá, at Drotturin yvir Dansinum brátt fór at skipa í vesturheiminum. Men tann góða tíðin slapp ikki at halda fram. Ein dagin hetta summarið, meðan tey ferðaðust í Spania, var Mary Ballard fyri einum døtti, sum tók henni so fast, at hon doyði stutt aftaná.

whazzzup!!!

Forrige Næste Svar Svar alle Videresend Flag Udskriv Rediger Slet Ombryd igen Udkast

**TELDUBRÆVIÐ**

Frá: Lena Ziskason, Sameindu Arabisku Emiríkini, erland.jensen@tku.ericsson.se
Til: turid@sosialurin.fo
Evni: Vikuskifti

## Hví ganga tær í svørtum?

Tá eg eri heima í Føroyum og ferðist, spyrja fólk ofta, hvussu tað er at búgva í einum muslimskum landi. Hvussu er tað, skal eg ganga svørtklødd? Kann eg fara á strondina í svimjidrakt? Tá eg so sigi, at eg kann ganga í tí sum eg vil, hyggja tey uppá meg, sum um tey ikki heilt trúgva mær.

Dubai er ein tann fríasti býurin í tí arabiska heiminum. Hann verður ofta róptur tann størsti transitbýurin í heiminum, tí her koma so nógv fólk allastaðni frá í heiminum, búgva her í eina stutta tíð, eini 3 til 5 ár, og so fara tey víðari. Hetta merkir, at býurin er sera fríur. Her eru sjálvandi tey, sum eru fødd og uppvaksin her og sum oftast eru muslimar, og so teir muslimar, sum koma aðrastaðni frá og tey ganga sum oftast klødd, sum muslimar ofta gera. Menninir í hvítum kjólum og kvinnurnar í svørtum frakkum og svørtum turriklæði. Tær hava antin turriklæði bert fyri hárið og munnin, so bara eyguni síggjast ella eru tær heilt svartar. Tú sært kvinnur í svørtum frakka, svart turriklæð yvir alt høvdið og svartar handskar. Men tú sært eisini ótrúliga nógv vanlig fólk. Her hugsi eg um nógvar vesturlendingar, sum ganga klæddir akkurát sum vit gera heima. Einasti munur er, at her er eitt sindur heitari, so tað er sum oftast shorts/niðurdeilar og T-shirtir.

Lond sum Saudi Arabia, Pakistan og onnur her á leiðini eru ógvuliga traditiónsbundin. Tey vilja helst ikki hava, at nakar kemur útifrá og ávirkar teirra dagligdag. Har er tað eitt krav, at allar kvinnur ganga í svørtum og tú sum útlendingur skal eisini ganga í svørtum, um tú fert út millum fólk. Tú skalt ikki skilja teg burturúr mongdini við at ganga annaðleiðis klæddur enn teirra kvinnur gera. Summi siga, at tú skalt ikki koma útifrá og vísa teirra kvinnum, hvussu vit hava tað. At vit kunnu ganga klødd sum vit vilja, at vit kunnu koyra bil osv.

Spyrt tú kvinnurnar her í Emiratunum, siga tær, at øll hesi krøv, ið verða sett til útlendskar kvinnur, ið koma til Saudi Arabia og onnur lond, eru bara tí at menninir í tí ávísa landinum skulu vísa sína makt yvir øðrum. Soleiðis er tað ikki her í Emiratunum.

Grundin til, at tær skulu ganga klæddar, sum tær gera, hevur onki við ta muslimsku trúnna at gera. Tað er teirra tjóðdrakt her í arabiska heiminum. Ein gomul traditión her er, at kvinnurnar ikki skulu vísa seg fyri øðrum monnum. Tað má ikki henda, at ein maður fær eyga á eina kvinnu, tí hon sær gott út. Tær skulu allar síggja líka út, soleiðis at ongin vendir sær eftir teimum.

Um tær so bert eru í svørtum frakka og turriklæð ella tær eru heilt svartar, er upp til hvørja familju at avgera. Tað eru menninir í hennara familju, sum oftast avgera, hvussu tær skula ganga klæddar.

Tær verða eisini uppaldar við at fáa at vita, at ongin skal venda sær eftir teimum. Tí vilja tær eisini sjálvar ganga í hesum svørtu frakkunum.

Eg havi verið til onkrar fyrilestrar, sum eru hildnir av lokalum kvinnum herniðri og tær siga allar, at teimum dámar væl at ganga sum tær gera. Tær høvdu følt seg øgiliga illa, um tað vóru menn sum vendu sær eftir teimum. Tú fært eisini at vita herniðri, at tú skalt respektera, hvussu tey ganga ílatin og endiliga ikki venda tær eftir teimum. Heldur ikki er loyvi at taka myndir av teimum.

Eitt, sum man so kann undrast yvir er, at tá tað eru so nógv rík fólk herniðri, kunnu tey ikki brúka pengar uppá klæðir til kvinnurnar. Men so er ikki. Tað sigst, at tær arabisku kvinnurnar eru tær í heiminum, sum brúka flest pengar uppá taskur og skógvar, tí tað kunnu øll síggja, tá tær ganga úti. Eisini fáast øll tey dýrastu "designer" klæðini herniðri. Og tær ganga næstan allar í tí allar fínasta og nýggjasta innanundir frakkanuum. Tí tá tær fara at vitja sínar vinkonur, so kunnu tær lata seg úr frakkunum og taka turriklæði av høvdinum og vísa teirra fínu klæðir fram. Her er tað nevniliga ikki vanligt, at kvinnur og menn sita í somu stovu, tá tey vitja hvønn annan. Tey hava altíð minst tvær stovur, eina til kvinnur og eina til menn!



# Eingin fær gleði av smáum og bíligum fiski

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Ein øgilig rúgva av fiski kemur uppá land í hesum døgum, serliga av upsa.

Hetta er sjálvandi gleðiligt, men trupulleikin er, at ein stórur partur av hesum er rættiliga smáur fiskur. Undirmálarar, vildi mangur sagt fyri fáum árum síðan. Hálini eru stór og talið av fiski er hareftir. Torført er hjá fiskimonnum at fáa fiskin undan, soleiðis sum neyðugt er, um dygdin á fiskinum skal vera í lagi. Inni á virkjunum standa fólk uppundir hendur í fiski. Maskinurnar kunnu bara skera eitt ávíst tal um tíman, og reinskerarar hava bara tær somu tvær hend urnar at arbeiða við. Tað ger ikki støðuna betri, at óvanliga lýtt er í veðrinum í hesum døgum.

### Stór hál

Triðja páskadag landaðu Vesturtúgvan og Vesturvarði í Miðvági. Teir høvdu ávikavist 160.000 og 190.000 pund, meginparturin smáur upsi. Vesturvarði er lemmatrolari; Vesturtúgvan partrolarar saman við Grønanesi.

Albert Ellefsen, virkisleiðari á Fiskavirking í Miðvági, sigur, at ein partur av hesum fiskinum er arbeiddur í Miðvági og ein partur á øðrum virkjum kring landið.

- Tann stóru trupulleikin er, at hálini hesar seinastu dagarnar hava verið so stór, at hetta gongur útyvir dygdina á fiskinum. Haraftrat kemur, at fiskurin er sera smáur, so torført er hjá fskimonnum at reinsa undan.

Hann vísir á, at inni á virkjunum tekur tað eisini langa tíð at arbeiða hendan fiskin, tí hann er so smáur og dygdin í ávísum førum einki er at reypa av. Fiskurin verður reyður og nógv verður skorið burtur. Tí verður úrtøkan eisini lítil.

- Eingin fær gleði av smáum og bíligum fiski, heldur ikki, um tú fært hann fyri einki. So, hetta er ein keðilig støða, sum vit eru í beint nú, sigur Albert.

*Ein stórur partur av upsanum, sum kemur uppá land í hesum døgum, fer til blokkframleiðslu, og bert ein lutfalsliga lítil partur fer til portiónir*

### Góður fiskur og gott lag

Hann sigur, at tað merkist væl á fólki, serliga teimum, sum reinskera, tá ið fiskurin er góður.

- Øll vilja arbeiða góðan fisk. Er fiskurin góður, er gott lag á fólki, tí tá gongur framleiðslan nógv betur, sigur virkisleiðarin.

Ein stórur partur av upsanum, sum kemur uppá land í hesum døgum, fer til blokkframleiðslu, og bert ein lutfalsliga lítil partur fer til portiónir.

Albert vísir á, at eitt, sum er við til at gera støðuna uppaftur truplari og trýstir upsamarknaðin, er, at djúpvatnstrolararnir eisini liggja á upsanum, hýsuni og toskinum.



- Eg vil siga, at fiskurin sum heild er smáttfallandi í løtuni, bæði upsin, hýsan og toskurin, og tá ið so nógv kemur uppá land, sum í hesum døgum, gongur tað útyvir dygdina á fiskinum og harvið vøruna, sum fer av landinum, sigur Albert Ellefsen.

Sum skilst, er upsaprísurin lækkaður nakað í seinastuni.

# Vinnulívið søkir eisini um stuðul til gransking

**Eitt tað fyrsta, sum formaðurin í Granskingarráði Føroya, Eyðun Andreasen, fer at gera, er at seta stjóra í Granskingargrunnin**

GRANSKING
*Vilmund Jacobsen*

Eyðun Andreasen er tilnevndur formaður í Gransk ingarráði Føroya. Hesa avgerð tók landsstýrismaðurin í mentamálum, 4. apríl.

Eyðun, sum er 57 ára gamal og útbúgvin mag. art í fólkminnisfrøði, starvast sum professari við Fróðskaparsetur Føroya.


*Landsstýrismaðurin í mentamálum hevur tilnevnt Eyðun Andreasen til formann í Granskingarráði Føroya. Eyðun hevur verið formaður í ráðnum í tvey ár*

Í tíðindaskrivi, sigur Mentamálastýrið, at Eyðun hevur eina sera umfatandi vitan um føroyska mentan, mentanarlív og gransking yvirhøvur.

Eyðun hevur verið formaður í Granskingarráði Føroya í tvey ár.

### Ráðgevandi

Uppgávan hjá Granskingarráðnum, sum er sjálvstøðugt ráð undir Mentamálastýrinum, er eitt nú at ráðgeva landsstýri og løgtingi í granskingarpolitiskum spurningum, fylgja við menningini innan føroyska og millumtjóða gransking og ráðgeva í spurningum um, hvussu gransking kann gerast gagnlig fyri samfelagið, bæði á almenna og privata økinum. Ráðið skal eisini viðgera umsóknir um granskingarstuðul og geva landsstýrinum tilmæli um, hvørjum granskingarstuðul eigur at verða latin av tí peningi, sum settur er av á fíggjarlógini til endamálið.

Mentamálastýrið fegnast um stóra áhugan at søkja um granskingarstuðul, og fegnast verður eisini um, at vinnulívið søkir um stuðul haðani.

- Eitt tað fyrsta, sum Eyðun Andreasen fer undir sum formaður í ráðnum, er at seta stjóra í Granskingargrunnin. Níggju umsóknir eru til stjórastarvið, sigur Mentamálastýrið í tíðindaskrivinum.